# Eitt fólkavalt grundlógarráð

**Val skal skrivast út til eitt grundlógarráð. Tað er ætlanin hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum. Fólkavalda grundlógarráðið skal skipa fyri fundum og hoyringum, har ymiskir tættir í einari føroyskari grundlóg kunnu takast upp í almennum høpi**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*



*Fólkið skal hoyrast. Eitt fólkavalt grundlógarráð fær heimild at skipa ting, sum í gomlum døgum, har fólk kunnu viðgera grundleggjandi rættartrygd, mannarættindi og rættin til náttúrutilfeingið*

Ein føroysk grundlóg skal setast aftur á sporið.

Næsta stigið í ætlanini er, at eitt grundlógarráð skal setast, sum er valt á einum vali, har øll, sum hava valrætt til løgtingið, kunnu velja.

Uppskotið var fyri á landsstýrisfundi tann 21. november, og formaðurin og skrivarin í grundlógarnevndini, ávikavist Jóan Pauli Joensen og Kári á Rógvi, hava verið og kunnað politiskar flokkar um málið.

### Alment kjak

Øll fólk, sum hava 20 stillarar aftan fyri seg, kunnu stilla upp til grundlógarráðið.

– Endamálið við einum fólkavaldum grundlógarráði er at fáa eitt alment kjak um ávís grundleggjandi mál undir einum demokratiskum rættarsamfelagi – eitt nú mannarættindi, rættartrygd og rættin til náttúrutilfeingið, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Hóast stórt arbeiði er lagt í grundlógararbeiðið higartil, so hevur tað verið eitt heldur afturlatið kjak. Fólksins rødd er ikki hoyrd enn. Við einum fólkavaldum grundlógarráði, væntar landsstýrið, at tann parturin av kjakinum kemur við.

Grundlógarráðið skal kunna halda ting, eins og vártingið í gomlum døgum, har ávís evni vera tikin upp.

– Endamálið er stutt sagt at fáa tað demokratiska elementið fram. Vit kundu saktans havt gjørt eitt uppskot, og lagt tað fyri tingið av okkara eintingum. Eitt fyribils uppskot liggur eisini á borðinum, men endamálið við eini grundlóg er, at fólkið stendur aftanfyri og hevur verið við í viðgerðini, sigur Høgni Hoydal.

### Ymisk støði

Landsstýrismaðurin, sum hevði sjálvstýrismál undir sær í síðsta valskeiði, ásannar, at ikki øll eru samd um, hvørt Føroyar skulu vera sjálvstøðugt land við egnari grundlóg. Tí er tað heldur ikki vist, at undirtøka fæst fyri leistinum, sum hann nú arbeiðir við.

– Tað eru fleiri mátar at seta eina grundlóg í verk. Antin kunnu vit bíða, til vit hava fingið fullveldi í Føroyum, ella kunnu vit gera ein grundlóg, sum hevur greiðar ásetingar um, hvussu vit kunnu skipa eitt føroyskt fullveldi við fólkaatkvøðu, sigur Høgni Hoydal.

Allir flokkar tóku lut í grundlógararbeiðnum, sum varð gjørt í grundlógarnevndini, har politikarar og embætisfólk luttóku.

Higartil hevur grundlógararbeiðið kostað umleið tríggjar milliónir krónur.

## Flætta pedagogar og lærarar saman

**Nú verður ein arbeiðsbólkur settur, sum hevur til endamáls at orða eitt felags grundarlag fyri pedagog- og læraraútbúgvingina**

LÆRARASKÚLIN
*Ingi Rasmussen*

Lógirnar fyri Føroya læraraskúla og Føroya pedagogskúla skulu endurskoðast. Arbeitt hevur verið við málinum í áravís, men enn er onki komið á borðið. Nú er líkt til, at glið kemur á málið.

Í løtuni verður arbeitt við at seta eina arbeiðsnevnd og at orða ein arbeiðssetning, sum hevur verið til ummælis hjá Lærarafelagnum og Pedagogfelagnum, greiddi Annlis Bjarkhamar frá í løgtinginum týsdagin.

Fyrst í januar mánað komandi ár er helst greitt, hvør kemur at sita í arbeiðsbólkinum. Tað serliga við hesum bólkinum er, at hann verður mannaður við bæði pedagogum og lærararum.

– Báðar útbúgvingarnar snúgva seg um menningina hjá barninum, frá tað er eitt hálvt ár til tað er 17 ár, og tí hava vit hildið tað verið skilagott at flætta grundarlagið fyri pedagog- og læraraútbúgvingina saman, og tað hava vit eisini fingið undirtøku fyri, sigur Annlis Bjarkhamar.

Sostatt verður talan um at gera ein felags arbeiðsbólk, sum ger eitt felags grundarlag fyri skúlarnar báðar. Ætlanin er so at gera tvær rammulógir, eina fyri hvønn skúla, og síðan at smíða kunngerðir út frá tí.

Landsstýriskvinnan vónar og væntar, at nýggja læraraútbúgvingin verður liðug í august 2004.

# Fakfeløgini himprast

**Løgmaður noyðist at endurskoða sínar ætlanir við verkætlanarbólkinum, skal eftir ætlan skal samskipa arbeiðsmarknaðarmál. Fakfeløgini vilja treyðugt luttaka í bólkinum, tí tey meta, at arbeiðsgevarasíðan er yvirumboðað**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Ingi Rasmussen*

Fakfeløgini á bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðinum himprast við at taka lut í verkætlanarbólkinum, sum løgmaður hevur tikið stig til.

Tað gongur fram av brævaskifti millum fakfeløgini og løgmansskrivstovuna.

Tað var tann 11. november 2002, at Anfinn Kallsberg løgmaður setti pørtunum á arbeiðsmarknaðinum stevnu á Hotel Føroyum. Endamálið var at fáa eitt felags stev í ávísum arbeiðsmarknaðarmálum, sum hava elvt til stórar ósemjur síðstu árini.

Eitt úrslit frá fundinum var, at ein verkætlanarbólkur skuldi setast at standa fyri arbeiðnum at samskipa ávís arbeiðsmarknaðarmál.

Nú eru fakfeløgini boðin at velja umboð í bólkin. Men tey aftra seg, sæst á brøvum, sum eru send løgmansskrivstovuni.

### Skeivt býti

Løgmansskrivstovan skýtir upp, at arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hava trý umboð hvør í verkætlanarbólkinum. Harafturat skulu trý aðalráð – Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið, og Almannaráðið – hava hvør sítt umboð. Oman yvir hesum skal Løgmansskrivstovan hava eitt umboð, ið samskipar alt arbeiðið.

Hendans samanseting hóvar ikki fakfeløgunum.

Arbeiðarafeløgini vísa á, at landsstýrið er størsti arbeiðsgevari í landinum. Tey ásanna samstundis, at aðalráðini undir landsstýrinum hava víst lítlan áhuga í at lurta eftir teimum sjónarmiðum, sum fakfeløgini hava sett fram.

»Undir hesum umstøðum er greitt, at við verandi uppskoti tykkara, so hevði verkætlanarbólkurin verið mannaður við 3 løntakaraumboðum og 6 ella 7 umboðum fyri arbeiðsgevarasíðuna, og hetta kunnu vit sjálvsagt als ikki góðtaka«, skriva Føroya arbeiðarafelag, Klaksvíkar arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufelag og Havnar arbeiðsmannafelag í teirra felags skrivi til løgmann tann 27. november.

### Ógreitt mál

Starvsmannafelagið vísir eisini sín illvilja ímóti at fara upp í arbeiði.

Felagið vísir á, at arbeiðssetningurin hjá bólkinum er ógreiður og setir eisini spurnartekn við samansetingina av bólkinum. Niðurstøðan er, at felagið ikki fer inn í arbeiðið.

»Tað krevur eina nógv greiðari og betri upplýsing, hvat veruliga ætlanin er við einum slíkum tiltaki, áðrenn vit kunnu viðgera hetta í álvara. Og vit fara eisini at ávara ímóti, at vit vera gjørd til kastibløkur fyri at fáa innanhýsis samgongupolitiskar kabalur til at ganga upp«, skrivar Gunnleivur Dalsgarð, formaður, í hvassorðaðum brævi til løgmann.



# Tvær vikur í arbeiðslívinum

**10. flokkarnir á Tvøroyri í starvsvenjing**

STARVSVENJING
*Birita í Dali og Mariann Mortensen*

Nú eru næmingar aftur úti og royna seg á ymsum starvsstøðum. Vit hava verið og prátað við fimm næmingar í 10. flokki úr Tvøroyrar skúla, sum eru í starvsvenjing í Havn



*Hanus og Janus standa uttan fyri skipasmiðjuna, har teir eru í starvsvenjing. Teir hava havt ein strævnan dag*

### Tórshavnar Skipasmiðja

Hanus Toftheyggj úr Hvalba og Janus Jespersen úr Øravíkarlíð eru í starvsvenjing á Tórshavnar skipasmiðju.

Hví teir júst valdu skipasmiðjuna, vita teir ikki.

– Tað ljóðaði áhugavert at sleppa at skrúa, og onkrastaðni skal ein jú fara!, sigur Janus.

Teimum dáma sera væl at arbeiða á skipasmiðjuni, og teir læra nógv, sum kann verða teimum til nyttu. Hanus og Janus arbeiða millum annað á skipunum Norrønu og Phøniks.

Tað er ikki bert arbeiðið, sum ger, at teir trívast, men helst tað, at teir kenna seg væl millum hini starvsfólkini.

– Vit eru við allastaðni og verða ikki skúgvaðir til viks, sigur Hanus at enda.



*Theresa Hentze er í starvsvenjing í ùtvarp Føroya. – Tað er ein avbjóðing, at verða í ÙF, sigur hon*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

### Ein avbjóðing í ÚF

Theresa Hentze úr Trongisvági er í starvsvenjing í Útvarpi Føroya.

Hvønn dag finnur og spælir Theresa tónleik til sendingar. Eisini er hon við til ljóðupptøkur til jólakalendaran og sær, hvussu alt gongur fyri seg. So hevur hon úr at gera við tíðindum, barnaløtuni og mongum øðrum.

Øll eru blíð og fitt móti henni, og hon hevur sjáldan einki at gera.

– Alt tað, sum eg arbeiði við, er nakað eg havi hug til, sigur Theresa.

Tað einasta, Theresa heldur verða keðiligt, er, tá hon einki hevur at fáast við, men tíbetur kemur tað sjáldan fyri.

Theresu dámar væl at arbeiða í útvarpinum, men hon ætlar sær tó ikki at arbeiða innan fyri hetta yrki.

– Í útvarpinum kanst tú rættiliga bjóða teg sjálvan av, leggur Theresa afturat.



*Mirjam Nattestad er í starvsvenjing hjá djóralæknanum. Her situr hon við eini sjóneyku og hyggur eftir eini kettuloppu*

### Svímaði hjá djóralæknanum

Mirjam Nattestad úr Hvalba er í starvsvenjing hjá Djóralæknatænastuni í Havn. Hon er ein sannur djóravinur, og hon hevur altíð ynskt sær at arbeitt við djórum. Nú hevur hon vissiliga fingið ynskið at ganga út.

Hon hevur arbeitt við djórum dagin langan hesar síðstu 14 dagarnar. Hon hevur hugt, meðan djór hava verið undir skurð, og her hevur hon eisini hjálpt til. Síðani hevur hon arbeitt við neytum, hundum, kettum og kaninum.

Fyrsta dagin Mirjam var í starvsvenjing, var hon hjástødd, meðan djóralæknin trekti tenninar úr einum hundi, sum hevði munnbruna. Hetta var ov nógv av tí góða, og hon small beint í gólvið.

Mirjam er í roynd og veru yvirraska, at hon sleppur at gera so nógv áhugavert. Hon fylgir læknunum, har teir fara. Læknin kann enntá vekja Mirjam á miðjari nátt, um okkurt áhugavert kemur fyri.

- Hjá djóralæknunum er betri enn eg hevði væntað, sigur Mirjam.

Hon hevur altíð ætlað sær at lært til djóralækna, og nú er hon vís í, at tað er hennara lívsmál, sjálvt um tað krevur góð skúlaummæli og langa lærutíð.




*Annika Vang er í starvsvenjing á løgreglustøðini í Havn. Her situr hon við einum narkohundi.*

### Spennandi á Løgreglustøðini

Annika Vang av Tvøroyri er í starvsvenjing á løgreglustøðini í Havn.

Her valdi hon at fara, tí hon hevur altíð havt áhuga innanfyri hetta starvið, og hon ætlar sær kanska at læra til løgreglukvinnu seinni.

Annika hevur verið úti fyri mongum spennandi og áhugaverdum í starvsvenjingartíðini.

Hon hevur rættiliga upplivað løgreglulívið, har hon hevur roynt seg á narkodeilduni, verið í brummuni og enntá verið við løgregluni í sambandi við eitt ferðsluóhapp.

– Mær dámar rættiliga væl, og alt er nýtt og spennandi, sigur hon.

So hevur hon eisini verið á fútaskrivstovuni, í rættinum og koyrt patrulju. Anniku dámdi best at vera við til hundavenjingina í fjøllunum. Tá skuldi hon renna undan hundunum við einum plastikarmi, sum teir royndu at bíta í.

– Vist havi eg havt eina kunnandi tíð, sigur Annika væl nøgd.

Sostatt enda summi við at svíma og fáa sín dreym uppfyltan, og onnur læra eitt sindur meira um seg sjálvan upp á tvær áhugaverdar vikur.

## Vilji skal til

**Tað eru tríggir partar, sum kunnu vera við til at gera ein starvsvenjing so góða sum møguligt fyri næmingin. Teir eru skúlin, starvsstaðið og næmingurin sjálvur**

STARVSVENJING
*Birita í Dali og Mariann Mortensen*

Starvsvenjing er týdningarmikið fyri ein næming. Tí tá hann fer í starvsvenjing, kann hann finna útav, um starvið er nakað fyri hann ella ikki. Soleiðis kann næmingurin eisini fáa eina hóming av, hvussu tað veruliga arbeiðslívið er.

Tríggir eru partarnir, sum kunnu gera eina starvsvenjing góða. Teir eru:

- skúlin,
- starvsstaðið
- og næmingurin sjálvur

Skúlin eigur at kunna næmingin um, hvørji starvsstøð hann kann velja, og hvussu hann sleppur at royna seg. Meðan næmingurin er í starvsvenjing, halda vit, at skúlin eigur at ringja til næmingin í hvussu er einaferð og sikra sær, at alt gongur væl, so næmingurin ikki bert situr og keðir seg dagin langan.

Tá næmingurin er liðugur við sína starvsvenjing, hevði tað verið eitt gott hugskot, at skúlin kravdi ein stuttan samandrátt um starvsvenjingina frá næminginum. Og síðan sent samandráttin til starvsstaðið, har staðið fekk vitan um, hvat næmingurin fekk burturúr.

Arbeiðsstaðið skal eisini gera sítt fyri næmingin, sum er í starvsvenjing. Tá ein næmingur kemur í starvsvenjing, er tað sum oftast sjálvsagt, at hann vil royna seg í starvinum, og tí er tað skilagott at geva næminginum ymsar uppgávur.

Eisini er tað umráðandi, at næmingurin kennir seg væl millum starvsfólkini og ikki verður skúgvaður til viks. Næmingurin skal helst fella inn í gerandisdagin á starvsstaðnum.

Um hetta ikki er gjørligt, er tað sjáldan nøkur góð orsøk at taka ímóti næmingum.

Næmingurin hevur sjálvur stóra ávirkan á hvussu starvsvenjingin verður. Hann eigir at velja starvsstað við umhugsan, og á staðnum skal hann vísa áhuga. Næmingurin skal halda seg framat og gera sítt besta.

Fyri at fáa eina væleydnaða starvstíð, skal næmingurin hava vilja til tað.

Málið við starvsvenjing er, at næmingurin fer heim við størri vinnulívskunning, hægri sjálvsáliti og meiri sjálvbjargni